

## Bindiklubbar ella skeiðvirksemi !!

Ella nakrar familjur saman nakrar dagar?
Ein rundur føðingardagur o.s.v.

Hvat við Gimbrastovu við Ljósá?

Stórur eftirspurningur er, - bílegg í góðari tíð.

Nýggjar myndir eru á heimasíðuni.

www.ognir.fo

lp@ognir.fo
Tlf. 217300

## Heimsins herligastu til sølu



**Spf 3276 (Túgvurnar)**

**Við í keypinum:**
- On-line bíleggingarskipan
- On-line bókhaldsskipan
- Allar komandi bíleggingar

*www.tugvurnar.fo*
**Áhugaði ringja til + 45 4027 1195**

## Hjartafelagið

Aðalfundur verður mánadagin 28. mars í MBF húsinum kl. 19.00.

Skrá sambært lógum felagsins.

Eftir fundin hevur Jan Rasmussen lækni fyrilestur.

## TIL SØLU

Ein Citroen Xsara ST
við skaða, til sølu fyri kr 15.000

**Tlf 211269**

FRÓÐSKAPARSETUR · FØROYA

# Fróðskaparsetur Føroya søkir eftir rektara

Starvið sum rektari við Fróðskaparsetur Føroya er leyst at søkja

**Starvsøki**
Sambært løgtingslóg nr. 58 frá 9. juni 2008 hevur rektarin dagligu leiðsluna av Fróðskaparsetri Føroya innan teir karmar, sum stýrið hevur ásett. Víst verður í hesum sambandi til Rektarafyriskipan frá 17. mars 2010.

Umsøkjarar eiga á heimasíðuni www.setur.fo at gera seg kunnugar við skjølini: Rektarafyriskipan; Fróðskaparsetrið, avbjóðingar og krøv til rektaran; Tíðarætlan og setanarnevnd.

**Førleikakrøv**
Í løgtingslógini um Fróðskaparsetur Føroya § 14, stk. 1 er ásett soljóðandi:

"Rektari skal hava royndir av leiðslu og kunnleika um granskingarumhvørvi, skal hava royndir og innlit í útbúgvingarøkið og hava skil fyri samspælið millum stovnin og samfelagið sum heild."

Somuleiðis verður kravt, at komandi rektarin hevur skjalprógvaðan granskingarførleika.

**Setanartreytir og umsókn**
Starvið sum rektari verður lønt í 39. lønarflokki sambært lønartalvuni fyri Tænastumannafelag Landsins, tó uttan at vera tænastumannastarv, og við 15% í eftirlønargjaldi.

Starvið verður áramálssett og setanartreytir annars verða ásettar í sersáttmála. Veitt verður viðbót áljóðandi 10% fyri áramálssetan.

**Umsóknarfreistin er 27. apríl 2011.**

Umsóknir saman við avriti av próvskjølum, CV og arbeiðsroyndum skulu sendast stýrisformanninum:

Herálvur Joensen
Sendistova Føroya í Keypmannahavn
Strandgade 91, 4. loft
1401 København K
Danmark

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Herálv Joensen, stýrisformanni, á heralvurj@mfa.fo
ella á tlf. +45 32833770.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo

Starvslýsing

Stuðuls- og Trivnaðartænastan

## Leiðari til Økisdepilin í Vági fyri sinnisveik

Í tráð við ætlanirnar hjá Stuðuls- og Trivnaðartænastuni um at samskipa allar tænastur innan Nærverkið, søkja vit eftir einum leiðara til Depilin fyri Sinnisveik í Vági. Starvið fevnir eisini um samskipan av Stuðulstænastuni í Suðuroynni. Starvið verður sett skjótast gjørligt.

Ert tú ein íverksetari og hevur kreativ evni, og hevur hug og dirvi at ganga nýggjar leiðir og møta nýggjum avbjóðingum, er tað tær, vit hava brúk fyri.

Talan er um eitt nýtt og spennandi starv við nýggjum avbjóðingum innan Stuðulstænastuna. Sum leiðari fært tú møguleikan at verða við til at uppbyggja og samansjóða allar tænasturnar, ið Stuðulstænastan hevur at bjóða í Suðuroynni. Og byggja uppá samstarvið við hinar tænastunar í Nærverkinum

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Frígerð Sundsskarð, deildarleiðari á tlf. 360000.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn saman við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu sendast til:

Nærverkið / Stuðulstænastan og Trivnaðartænastan
Stílað: Frígerð Sundsskarð, deildarleiðari
Argjavegur 26
Postsmoga 3037
FO 110 Tórshavn

**Umsóknarfreist : 25. mars 2011**

**Les alla lýsingina á heimasíðu okkara**
**www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið veitir tænastur til borgarar við serligum tørvi, sum búgva heima, á bústovnum ella á sambýlum. Vit skapa møguleikar fyri lívsgóðsku við støði í tørvi og førleika hjá tí einstaka. Okkara eyðkenni er, at starvsfólkið leggur dent á professionalismu, dygd og nærleika. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almannamálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Børn & Ung. Umleið 1600 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Argjavegur 26 · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn
Tel 360000 · Faks 360001 · naerverk@naerverk.fo · www.naerverk.fo

www.naerverk.fo




# *Móttøka*

*Í samband við at Ingeborg Vinther fer frá sum forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, verður móttøka í hølum felagsins Tjarnardeild 7*

***fríggjadagin 25. mars frá kl. 15.00 til kl. 17.00***

**Føroya Arbeiðarafelag**